## FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# KUNNGERÐ UM BÝRÁÐSFUNDIR 2009

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at almennu býráðsfundirnir fyri ár 2009 verða hildnir hesar hósdagar kl. 16.30 í býráðssalinum.

29. januar
26. februar
26. mars
23. apríl
28. mai
25. juni
27. august
24. september
29. oktober
26. november
10. desember

*Fuglafjørður, tann 12. desember 2008*

**Fuglafjarðar býráð**

## TVINGSILSSØLA

13. januar 2009, kl. 14:00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr. nr. 147a, Kvívík (AS nr. 2-41/2008).

Sambært tryggingarskjalinum er bygda økið 50 m². Talan er um eini hús, ið eru samanbundin við eitt annað hús, matr. nr. 165c, Kvívík. Grundin er grótupplagað, og stovu- og loftshædd er av timbri og klødd við aluminium. Takið er eisini av aluminium.

Húsini eru nærri innrættaði soleiðis:

**Miðhædd:** Gongd við innbygdum klædnarúmi, baðirúm við brúsu, stova og køkur.

**Loft:** Gongd og 3 kømur.

**Kjallari:** Kjallarin er óinnrættaður.

Húsini treingja til ymiskar ábøtur, men eru í rímiligum standi.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv. Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 4966701), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur, tann 11/12-08**

## Tvingsilssøla av báti

Týsdagin, tann 17. feb. 2009, kl. 13.00 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir útróðrarbátin »Skarðhamar« XPSR, KG398.

Fyrireikandi tvingsilssøla verður hildin týsdagin 13. januar 2009 kl. 9.00.

Báturin hevur havt fiskiloyvi í bólki 4T, við 14,70 fiskidøgum, men hevur ikki søkt um fiskiloyvi fyri árið 2008/09.

Báturin er bygdur í 1960 í Odense og er skrásettur sum heimahoyrandi í Hvannasundi.

Eigari av bátinum er Sp/f 14.12.06 c/o Tórur Simonsen, Hvannasund.

Tvingsilssølan er umbiðin av Jónfinn Thomsen, Áarvegur 1, Tórshavn, tel. nr. 311578, sak nr. 500088, sum kann geva nærri upplýsingar um bátin og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja bátin.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tel. nr. 311003, sak nr. 2-45-2008.

**Føroya Fútarættur, tann 11/12-08**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SKEIÐ Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA
– várið 2009

# Próvskeið í føroyskum

Á skeiðnum lærir tú at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi, og tú fært betri fatan av føroyska málinum.

| | |
|---|---|
| **Lærari:** | Randi Kúrberg |
| **Skeiðsstað:** | Fróðskaparsetur Føroya, Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd, 100 Tórshavn |
| **Tíðarskeið:** | 5. jan.-26. mars 2009 (12 vikur). |
| Próvtøka: | 28. og 30. mars 2009 |
| Tilmelding: | Tilmeldingarskjal á heimasíðuni: www.setur.fo |
| Tilmeldingarfreist: | 18. desember 2008 |
| Tilmeldingargjald: | kr. 1.000,00 |
| Próvtøkugjald: | kr. 500,00 |

Undirvísing er mánadagar og hósdagar, báðar dagar kl. 16.15 - 18.30, umframt leygardagin 7. mars kl. 9.00-14.30.

Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt sum móðurmál og hava gingið í miðnámsskúla ella samsvarandi.

Næmingatalið er avmarkað; næmingar verða upptiknir, so hvørt tilmeldingarnar koma inn, til talið er fult.

Nágreiniligari upplýsingar um skeiðið eru at fáa á Setursskrivstovuni. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo



# Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

## TVINGSILSSØLA

**Týsdagin tann 17. februar 2009, kl. 14:00** verður á Dómaraskrivstovuni, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fiskiskipið GORM, kallibókstavir XPSC, BRT 133 og NRT 40.

Skipið er bygt í 2003 á Hafnarfjørðinum í Íslandi og er skrásett sum heimahoyrandi á Glyvrum. Eigari av skipinum er P/F Kneysur.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram á Dómaraskrivstovuni, undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn **týsdagin, tann 13. januar 2009 kl. 9:30,** og verður tann, ið metir seg at hava veð ella onnur rættindi í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260** (sak nr. 4470802), sum kann geva nærri upplýsingar um skipið og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-46/2008).

**Føroya Fútarættur, tann 11/12-08**


# Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin tlf 341800



DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

# Vetrardekk




**Goodyear Ultra Grip 7+**

**Prísdømi:**
195/65-15.......... **980,-**
205/55-16 ...... **1.375,-**




**Continental TS830**

**Prísdømi:**
195/65-15.......... **990,-**
205/55-16 ...... **1.290,-**

# Komplet vetrarhjól

**– 15" ella 16" felgur við vetrardekkum**



**15" felgur við TS830**

**Kr. 6.900,- fyri settið**

Dekkstødd: 195/65-15

Felgurnar fáast til flestu bilmerki



**16" felgur við TS830**

**Kr. 8.400,- fyri settið**

Dekkstødd: 205/55-16

Felgurnar fáast til flestu bilmerki

**www.dekkmaster.fo**
**info@dekkmaster.fo**
**telefon 227 000**